**Løgmansskrivstovan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24.06.2022 |
| Mál nr.: | 21/24057 |
| Málsviðgjørt: | JAK |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í sambandi við dagføring av konkurslógini fyri Føroyar**
(Gjaldsteðgur og neyðskuldarsemja verður broytt til endurskipan, reglur um trotabúsbann verða settar inn í grannskoðaralógina)

*Almannamálaráðið*

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 138 frá 6. oktober 2011 um lutaíbúðafeløg, verður § 5, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Áheitan um endurskipan má ikki vera latin inn av ella ímóti einum stovnara, og ein stovnari má ikki vera undir trotabúsviðgerð."

*Fíggjarmálaráðið*

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 25. mai 2009, verður § 2, stk. 2, 2. pkt. orðað soleiðis:
"Er fyritøkan undir endurskipanarviðgerð, er dagurin, tá skiftiætturin fekk áheitanina um endurskipanarviðgerð, freistdagur, um fyritøkan vegna insolvens er hildin uppat áðrenn 3 vikur aftaná, at endurskipanin hevur mist gildi eftir konkurslógini."

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 10, nr. 1, litra d orðað soleiðis:
"d) er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð."

**§ 4**

Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin), sum seinast

broytt við løgtingslóg nr. 173 frá 21. desember 2021, verður í § 7, stk. 1 “neyðskuldarsemju” broytt til: “endurskipan”.

*Løgmansskrivstovan*

**§ 5**

Í Lov nr. 102 af 6. april 1906 om Køb, sum broytt við anordning nr. 371 af 20. december 1961, anordning nr. 588 af 4. november 1982, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, anordning nr. 184 af 15. marts 1989 og anordning nr. 398 af 20. april 2010, verður í § 39, stk. 1, 1. pkt. “eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord for ham” broytt til: “eller rekonstruktionsbehandling”.

**§ 6**

Í Lov nr. 243 af 8. maj 1917 om Kommission, Handelsagentur og Handelsrejsende, verður í § 37, stk. 1, 2. pkt. “Tvangsakkord” broytt til: “rekonstruktion”.

**§ 7**

Í Lov nr. 146 af 13. april 1938 om Gældsbreve, sum broytt við anordning nr. 371 af 20. december 1961, anordning nr. 588 af 4. november 1982, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, anordning nr. 184 af 15. marts 1989 og anordning nr. 398 af 20. april 2010, verður í § 17 “Tvangsakkord” broytt til: “rekonstruktion”.

**§ 8**

Í Lov nr. 68 af 23. Marts 1932: Veksellov, sum broytt við lov nr. 411 af 30. november 1965 og løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 43, stk. 2, nr. 2 og 3 verður “Konkurs, eller der er aabnet Forhandling om Tvangsakkord for ham” broytt til: “rekonstruktionsbehandling eller konkurs”.

**2.** Í § 44, stk. 6, 1. pkt. verður “Konkurs, eller er der aabnet Forhandling om Tvangsakkord for ham” broytt til: “rekonstruktionsbehandling eller konkurs”, og “Akkordforhandlingen aabnes” broytt til: “rekonstruktionsbehandlingen indledes”.

**3.** Í § 44, stk. 6, 2. pkt. verður “Konkurs, eller der aabnes Forhandling om Tvangsakkord for ham” broytt til: “rekonstruktionsbehandling eller konkurs”.

**§ 9**

Í Lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: Straffeloven (Revsilógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 22. apríl 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 283, stk. 1, nr. 2 verður “ella eftir at tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang eru byrjaðar” broytt til: “ella eftir at endurskipanarviðgerð er byrjað”.

**2.** Í § 283, stk. 2 verður “gjaldssteðgur” broytt til: “endurskipanarviðgerð”.

**3.** Í § 300, nr. 3 verður “neyðugar váttanir til at byrja tingingar um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang” broytt til: “neyðugar váttanir undir endurskipanarviðgerð”

**4.** Í § 304, stk. 2 verður “tingingum um neyðskuldarsemju uttan fyri húsagang” broytt til: “endurskipanarviðgerð”.

*Umhvørvis- og vinnumálaráðið*

**§ 10**

Í løgtingslóg nr. 129 af 15. april 1930 um tryggingaravtalur, sum broytt við anordning nr. 460 af 9. september 1975, anordning nr. 150 af 21. marts 1988, lov nr. 50 af 24. februar 1960, lov nr. 179 af 24. maj 1972 og løgtingslóg nr. 33 frá 31. mars 2017, verður í § 28, 1. pkt. “, eller aabnes der Forhandling om Tvangsakkord udenfor Konkurs i hans Bo” broytt til: “eller rekonstruktionsbehandling”.

**§ 11**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 10. desember 2021, verður § 47 g orðað soleiðis:

“**§ 47 g.** Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn avgerð um húsagang móti veðsetara er tikin, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina.
*Stk. 2.* Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn skiftirætturin tók avgerð um at fara undir endurskipanarviðgerð, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um skuldarumskipanarmál er byrjað, tá avgerð verður tikin um at fara undir endurskipanarviðgerðina.
*Stk. 3.* Virkisveð, sbr. § 47 d, ella kravsveð, sbr. § 47 e, stovnað áðrenn, at skiftirætturin tók avgerð um at fara undir skuldarumskipanarmál, fevnir ikki um ogn, ið er útvegað eftir avgerðina. Hetta er ikki galdandi, um búgv veðsetarans, tá avgerðin verður tikin, er undir trotabúsviðgerð, ella endurskipanarviðgerð er byrjað.”

**§ 12**

Í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki, sum broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001, løgtingslóg nr. 32 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 124 frá 22. desember 2010, løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 133 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019 og løgtingslóg nr. 28 frá 11. mars 2022, verður § 10, stk. 4, nr. 4 orðað soleiðis:
“4) reiðarin er undir endurskipanarviðgerð, ella”.

**§ 13**

Í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 26. mai 2010, løgtingslóg nr. 50 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 67 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verður § 40, stk. 1, litra c orðað soleiðis:
“c) fer loyvishavarin undir endurskipanarviðgerð, á húsagang, í likvidatión ella kemur í líka støðu.”

**§ 14**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012, løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verður § 22 orðað soleiðis:

“**§ 22.** Loyvi eftir § 4 kann verða tikið aftur, um:
1) lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð verða brotin við vilja ella av grovum ósketni,
2) tað í umsókn um loyvi eru givnar skeivar ella villleiðandi upplýsingar,
3) loyvishavarin fer undir endurskipanarviðgerð, letur inn umsókn um konkurs ella verður koyrdur konkurs.

*Stk. 2.* Um bøtt kann verða um eitt brot, sum nevnt í stk. 1, kann landsstýrismaðurin boða eigaranum frá, at hesin innan fyri eina nærri ásetta freist skal halda sínar skyldur eftir loyvinum.

*Stk. 3.* Verður loyvið tikið aftur eftir stk. 1 frá eini fyritøku við framleiðsluskyldu, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni. Fer ein fyritøka við framleiðsluskyldu undir endurskipanarviðgerð, ella verður fyritøkan koyrd konkurs, uttan at loyvi verður tikið aftur, kann landsstýrismaðurin fyribils halda fram við loyviskravda virkseminum hjá fyritøkuni, um so er, at endurskipari ella kurator annaðhvørt ikki ynskja at halda fram við loyviskravda virkseminum, ella framleiðsluskylduga fyritøkan ikki heldur fram við framleiðsluskylduga virkseminum á nøktandi hátt. Endurskipari ella kurator skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi eina viku eftir avgerð hjá skiftirættinum um endurskipanarviðgerð ella eftir konkursdekretið boða landsstýrismanninum frá, um framleiðsluskylduga virksemið heldur fram ella ikki."

**§ 15**

Í anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2016 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 140, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Skráseting Føroya kann hóast freistina í § 138, stk. 1, 2. pkt. loyva, at ársroknskapurin hjá einari fyritøku, sum er undir endurskipanarviðgerð, verður at lata inn soleiðis, at Skráseting Føroya móttekur hann í seinasta lagi 1 mánað eftir, at endurskipanarviðgerðin er endað."

**2.** § 140, stk. 3 verður strikað.

**§ 16**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 49, stk. 3, nr. 2 verður orðað soleiðis:
"2) Nevndarlimur ella stjórnarlimur má ikki hava latið inn áheitan um ella vera undir endurskipanarviðgerð, konkurs ella skuldarumskipan."

**2.** Yvirskriftin yvir § 145 og § 145 verða orðað soleiðis:

"*Endurskipanarviðgerð*

**§ 145.** Tryggingareftirlitið kann lata inn áheitan um endurskipanarviðgerð fyri tryggingarfeløg, tá fyrilit fyri áhugamálunum hjá íleggjarum ella tryggingartakarum tala fyri tí.
*Stk. 2.* Áheitan um endurskipanarviðgerð sambært stk. 1 verður fylgd av uppskoti Tryggingareftirlitsins um, hvør skal tilnevnast sum endurskipari og álitispersónur undir við endurskipanarviðgerðini, umframt eina váttan frá teimum viðkomandi um, at hesi játta og lúka treytirnar í § 238 í konkurslógini."

**3.** Yvirskriftin yvir § 146 verður strikað, og §§ 146 og 147 verða orðaðar soleiðis:

"**§ 146.** Reglurnar í konkurslógini um endurskipanarviðgerð verða við loyvi Tryggingareftirlitsins at nýta á tryggingarfeløg, tó undantikið lívstryggingarfeløg.
*Stk. 2.* Í sambandi við støðuyvirlitið, ið skal sendast saman við endurskipanaruppskotinum, sbr. § 13, stk. 1, nr. 2 í konkurslógini, kann skiftirætturin, tá tað snýr seg um endurskipan av endurtryggingarfeløgum, eftir ummæli Tryggingareftirlitsins tilnevna ein óheftan tryggingarfrøðing til at gera eina uppgerð yvir virðið av krøvunum, ið eru fráboðað.

**§ 147.** Reglurnar í hesi løgtingslóg um heimildir hjá landsstýrismanninum og Tryggingareftirlitinum og skyldur hjá tryggingarfeløgum mótvegis landsstýrismaninum og Tryggingareftirlitinum verða, við neyðugum tillagingum, at nýta fyri tær fyritøkur, ið eru undir endurskipanarviðgerð ella eru farnar í avtøku."

**§ 17**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012, løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021 og løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 3, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
"3) ikki er undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,".

**2.** Aftan á § 3, stk. 1, nr. 3 verður sum nýtt nr. sett:
"4) ikki er álagdur trotabúsbann ella innan fyri tvey tey seinastu árini hevur verið álagdur trotabúsbann,".
Nr. 4-6 verða eftir hetta nr. 5-7.

**3.** Aftan á § 8 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 9, verður sett:

*"Trotabúsbann sambært konkurslógini*

**§ 8 b.** Grannskoðari, ið er álagdur trotabúsbann eftir konkurslógini, kann ikki geva grannskoðanarátekningar og váttanir eftir løgtingslógarinnar § 1, stk. 2 í 5 ár frá tí, at hann er álagdur trotabúsbann."

**4.** Í § 13, stk. 6 verður "neyðskuldarsemju" broytt til: "endurskipanarviðgerð".

**§ 18**

Í løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009 um elektroniska undirskrift verður § 19, stk. 6, nr. 3 orðað soleiðis:
"3) fer undir endurskipanarviðgerð ella fer á húsagang."

**§ 19**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 24, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Stovnari má ikki vera undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð."

**2.** Í § 37, stk. 1, 2. pkt. verður "ella fólk, ið Domstolsstyrelsen hevur tilnevnt sum yrkisserkøn álitisfólk í sambandi við samráðingar um neyðskuldarsemju" strikað.

**3.** Í § 232, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:

"Freistin upp á 3 mánaðir verður frestað, um felagið verður tikið undir endurskipanarviðgerð."

**4.** Yvirskriftin yvir § 233 verður orðað soleiðis:

"*Skifti til endurskipan ella trotabúarviðgerð*"

**5.** Í § 233, stk. 1 og 2, tvær staðni í stk. 3, og í stk. 4 og 5 verður "trotabúarviðgerð" broytt til: "endurskipanarviðgerð ella trotabúarviðgerð".

**6.** Í § 233 verður sum stk. 6 sett:
"*Stk. 6.* Í einum felagi, har endurskiparin hevur yvirtikið leiðsluna av felagnum, kunnu ikki fremjast skrásetingar viðvíkjandi felagnum, tó burtursæð frá broytingum viðvíkjandi møguligum grannskoðara, sum endurskipari hevur tilnevnt, ella broytingar, ið eru samtyktar av aðalfundinum, og sum endurskipari hevur givið samtykki til."

**7.** § 234 verður orðað soleiðis:
"**§ 234.** Eitt felag, ið er undir trotabúarviðgerð, skal varðveita navn sítt við ískoytinum: undir trotabúarviðgerð. Í aðrar mátar verður § 228, stk. 1 at nýta. Tá trotabúarviðgerð endar, verður tað skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya uttan so, at annað er ávíst í fráboðan skiftirættarins um hetta.
*Stk. 2.* Eitt felag, ið er undir endurskipanarviðgerð, skal varðveita navn sítt við ískoytinum: undir endurskipanarviðgerð."

**§ 20**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 6. oktober 2011 um keyp og sølu av fastogn o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 30. apríl 2018, verður § 25, stk. 2, nr. 3 orðað soleiðis:
"3) ikki er undir endurskipanarviðgerð,".

**§ 21**

Í løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um el riknar hitapumpuskipanir, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 29. mai 2017, verður § 9, stk. 1, nr. 1 orðað soleiðis:
"1) ikki vera undir endurskipanarviðgerð ella trotabúsviðgerð,".

**§ 22**

Í løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 5, stk. 3, nr. 2 orðað soleiðis:
"2) Nevndarlimur ella stjórnarlimur má ikki hava latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð, umsókn um konkurs ella skuldarumskipan ella vera undir endurskipanarviðgerð, konkursviðgerð ella skuldarumskipan."

**§ 23**

Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður § 46, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Skráseting Føroya skal lata vera við at skráseta eftir stk. 1, um ein limur í evstu leiðsluni ella dagligu leiðsluni í eini fyritøku ella persónurin er dømdur fyri revsiverd viðurskifti, ið hava við sær ein grundaðan váða fyri misnýtslu av starvinum ella uppgávuni, sambært § 78, stk. 2 í revsilógini, ella hevur latið inn áheitan um endurskipanarviðgerð, konkurs ella skuldarumskipan ella er undir endurskipanarviðgerð, konkursviðgerð ella skuldarumskipan."

*Gildiskoma*

| | |
|---|---|
| **§ 24** | Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023. |

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingið hevur í mars 2022 samtykt uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse ændringer i konkursloven m.v.

Broytingarnar, sum koma í gildi tann 1. januar 2023, snúgva seg í høvuðsheitum um at seta reglur um endurskipan/*rekonstruktion* og trotabúsbann/*konkurskarantæne* inn í konkurslógina.

Reglurnar um trotabúsbann koma ístaðin fyri reglur um gjaldsteðg, neyðskuldarsemju o.a., sum við áður nevndu anordning verða settar úr gildi.

Reglurnar verða ístaðin savnaðar í eitt nýtt, felags regluverk um endurskipan. Neyðugt er tí at rætta tilvísingar til hesar reglurnar í einari røð av løgtingslógum o.tíl.

Neyðugt er eisini at gera tillagingar í grannskoðaralógini, soleiðis at hon leggur upp fyri nýggju reglunum um trotabúsbann.

Fylgibroytingar skulu eisini gerast í kongligum fyriskipanum og í fólkatingslógum, men hetta lógaruppskotið fevnir bara um fylgibroytingar innan sermál - á yvirtiknum málsøkjum. Fylgibroytingar innan felags mál verða gjørdar av danska løgmálaráðnum.

*Endurskipan*
Endamálið við reglunum um endurskipan er at betra um møguleikarnar fyri, at virkir, sum eru í fíggjarligum trupulleikum, kunnu halda fram við at virka heldur enn at verða koyrd á húsagang.

Í galdandi konkurslóg eru reglur um gjaldsteðg og neyðskuldarsemju. Samtyktu broytingarnar byggja út og samantvinna reglurnar í eitt felags regluverk um endurskipan, sum leggur dent á at halda lív í virkinum.

Endurskipan snýr seg í høvuðsheitum um, at skuldari, saman við skiftirættinum og kreditorunum, skal royna fáa búskapin í einum kreppuraktum felag á beint, soleiðis at felagið aftur verður gjaldført.

Tá endurskipanarviðgerðin byrjar, tilnevnir skiftirætturin ein ella fleiri persónar at standa fyri endurskipanini (endurskipari/*rekonstruktør*) og ein roknskaparkønan álitispersón fyri skuldara. Uppgávan hjá endurskipara er at fáa eina semju í lag við kreditorarnar um eitt endurskipanaruppskot. Uppskotið til endurskipan skal annaðhvørt neyðskuldarsemju ella avhending av fyritøkuni, ella bæði.

Ber ikki á mál við einum endurskipanaruppskoti, verður virkið beinanvegin tikið undir trotabúsviðgerð.

*Trotabúsbann*
Trotabúsbann er, tá ein persónur, sum er farin á húsagang við einum virki, ella sum er uppií einum felagi í avtøku, í eitt tíðarskeið fær bann fyri at reka ávís sløg av vinnuvirksemi.

Ein treyt fyri trotabúsbanni er, at viðkomandi hevur sýnt groft skilaleysa virkisleiðslu og tí verður mettur óegnaður at vera í leiðsluni í einum felagi við avmarkaðari ábyrgd, t.e. smápartafelag ella partafelag.

Endamálið við trotabúsbanni er at fyribyrgja konkurskriminaliteti og *konkursrytteri*, sum er, tá partafelagsformurin ella smápartafelagsformurin systematiskt verður misnýttur til skaða fyri kreditorar.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu verður ikki víst til endurskipan, men til "gjaldsteðg" og "neyðskuldarsemju".

Grannskoðaralógin hevur í dag ongar reglur um trotabúsbann.

Lóggávan, sum verður broytt, er hendan (skipað undir stjórnarráð og eftir árstali):

**Almannamálaráðið:**

1. Løgtingslóg nr. 138 frá 6. oktober 2011 um lutaíbúðafeløg.

**Fíggjarmálaráðið:**

2. Løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 25. mai 2009.
3. Løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.
4. Løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 173 frá 21. desember 2021.

**Løgmansskrivstovan:**

5. Lov nr. 102 af 6. april 1906 om køb, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 6. mai 2015.
6. Lov nr. 243 af 8. maj 1917 om kommission, handelsagentur og handelsrejsende.
7. Lov nr. 146 af 13. april 1938 om Gældsbreve, som senest ændret ved anordning nr. 398 af 20. april 2010.
8. Lov nr. 68 af 23. marts 1932: Veksellov, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.
9. Lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: Straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 22. apríl 2021 (Revsilógin)

**Umhvørvis- og vinnumálaráðið:**

10. Løgtingslóg nr. 129 af 15. april 1930 um tryggingaravtalur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 31. mars 2017.
11. Løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 10. desember 2021.
12. Løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019.

13. Løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021.
14. Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 (Elveitingarlógin).
15. Anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2016 (Ársroknskaparlógin).
16. Løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021.
17. Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021 (Grannskoðaralógin).
18. Løgtingslóg nr. 74 frá 25. mai 2009 um elektroniska undirskrift.
19. Løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021 (Vinnufelagalógin).
20. Løgtingslóg nr. 136 frá 6. oktober 2011 um keyp og sølu av fastogn o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 30. apríl 2018.
21. Løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um el riknar hitapumpuskipanir, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 29. mai 2017.
22. Løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015 um P/F Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.
23. Løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 (Hvítvasklógin).

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at rætta tilvísingarnar í fylgilóggávuni til konkurslógina og harvið fáa fylgilóggávuna at samsvara við konkurslógina.

Endamálið er harafturat at tryggja, at grannskoðaralógin leggur upp fyri nýggju reglunum um trotabúsbann í konkurslógini, sum koma í gildi tann 1. januar 2023.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Allar tilvísingar í løgtingslógum o.tíl. til “gjaldsteðg”, “neyðskuldarsemju”, “tvangsakkord” o.s.fr. verða við uppskotinum broyttar til: “endurskipan” og “rekonstruktion” e.l.

Harafturat verða reglur um trotabúsbann settar inn í grannskoðaralógina.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at hetta uppskotið hevur beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna, tí talan er bara um fylgibroytingar.

Dagføringin av konkurslógini hevur tó sannlíkt positivar avleiðingar fyri vinnuna, tí møguleikarnir at halda lív í einum kreppuraktum felagið verða betraðir. Mett verður eisini, at reglurnar um trotabúsbann eru ein verja fyri vinnulívið.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk økir í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið er ikki í ósamsvari við EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið er ikki í ósamsvari við breksáttmálan.

### 2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær nýggjar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Við lógaruppskotinum verður grannskoðaralógin broytt soleiðis, at tað frameftir verður ein treyt fyri at fáa góðkenning sum grannskoðari, at grannskoðarin ikki er álagdur trotabúsbann ella innan fyri tvey tey seinastu árini hevur verið álagdur trotabúsbann. Harafturat verður grannskoðaralógin broytt soleiðis, at grannskoðari missir møguleikan at geva grannskoðanarátekningar og váttanir sambært § 1, stk. 2 í løgtingslógini í 5 ár frá tí degi, at viðkomandi er álagdur trotabúsbann.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til løgmann, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**§ 1**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Almannamálaráðnum.

Í § 5, stk. 2 í løgtingslóg nr. 138 frá 6. oktober 2011 um lutaíbúðafeløg verður orðið "gjaldsteðg" broytt til "endurskipan".

Endamálið er at tryggja, at løgtingslógin leggur upp fyri teimum broytingum í konkurslógini fyri Føroyar, sum Løgtingið hevur samtykt á vári 2022, og sum koma í gildi tann 1. januar 2023. Broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar snúgva seg m.a. um, at reglur um "endurskipan" verða settar inn í lógina ístaðin fyri reglur um "gjaldsteðg" og "neyðskuldarsemju".

**§§ 2-4**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Í trimum løgtingslógum, teirra millum í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi, verða reglur um endurskipan settar inn ístaðin fyri reglur um gjaldsteðg og neyðskuldarsemju.

Endamálið er at tryggja, at løgtingslógirnar leggja upp fyri teimum broytingum í konkurslógini fyri Føroyar, sum Løgtingið hevur samtykt á vári 2022, og sum koma í gildi tann 1. januar 2023. Broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar snúgva seg m.a. um, at reglur um "endurskipan" verða settar inn í lógina ístaðin fyri reglur um "gjaldsteðg" og "neyðskuldarsemju".

**§§ 5-9**
Hetta er lóggáva á økinum hjá Løgmansskrivstovuni.

Í trimum lógum, teirra millum í Lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: Straffeloven (Revsilógin), verða reglur um endurskipan settar inn ístaðin fyri reglur um neyðskuldarsemju.

Endamálið er at tryggja, at lógirnar leggja upp fyri teimum broytingum í konkurslógini fyri Føroyar, sum Løgtingið hevur samtykt á vári 2022, og sum koma í gildi tann 1. januar 2023. Broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar snúgva seg m.a. um, at reglur um "endurskipan" verða settar inn í lógina ístaðin fyri reglur um "gjaldsteðg" og "neyðskuldarsemju".

**§§ 10-23**

Hetta er lóggáva á økinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Flestu broytingarnar í uppskotinum eru á hesum økinum.

Í 14 løgtingslógum o.tíl., teirra millum í grannskoðaralógini, ársroknskaparlógini og vinnufelagalógini, verða reglur um endurskipan settar inn ístaðin fyri reglur um gjaldsteðg og neyðskuldarsemju.
Endamálið er at tryggja, at lógirnar leggja upp fyri teimum broytingum í konkurslógini fyri Føroyar, sum Løgtingið hevur samtykt á vári 2022, og sum koma í gildi tann 1. januar 2023. Broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar snúgva seg m.a. um, at reglur um "endurskipan" verða settar inn í lógina ístaðin fyri reglur um "gjaldsteðg" og "neyðskuldarsemju".

§ 17 í lógaruppskotinum ger broytingar í grannskoðaralógini. Við § 17, nr. 3 og 4 verður skotið upp at seta nýggja reglur inn í grannskoðaralógina, sum leggja upp fyri reglunum um trotabúsbann, sum eisini eru partur av samtykta uppskotinum um dagføring av konkurslógini fyri Føroyar, sum kemur í gildi tann 1. januar 2023.

**Til § 24**
Gildiskomuáseting.

Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi tann 1. januar 2023. Tað er samstundis sum broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar koma í gildi.

Løgmansskrivstovan, xx.xx.2022

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur